# Vinnuferðavinna

## – tilmæli um, hvussu Føroyar gerast eitt burðardyggari ferðamál



Vakstrarforum

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

*"Ferðavinnan er til fyri at menna okkara egna land fyri okkara egnu skyld. Vit skulu leggja dent á ferðafólk, sum koma fyri tað, vit eru, og tað, vit vilja hava, heldur enn tað, ferðafólkini vilja hava."*

**Fríðun Jacobsen,** stjóri í Greengate,
endurgivin frá fundinum við umboðum fyri ferðavinnuna

**VINNUFERÐAVINNA** · Útgivið: Løgmansskrivstovan © 2022 · Sniðgivið: VIRKA · Myndir: Visit Faroe Islands

# VINNUFERÐAVINNAN **NÆRUM TRÍFALDAST**

Í 2030 eru Føroyar eitt náttúruferðamál, og vit hava fingið vitan og skipanir, ið varðveita náttúru og umhvørvi. Við einum endurskapandi hugburði hevur ferðavinnan verið partur av loysnini. Fundir og ráðstevnur hava birt upp undir vøkstur, nýskapan og altjóða samstarv. Ferðavinnan er á høgum altjóða stigi við gistingarhúsum, ráðstevnu- og ítróttarumstøðum, matstovum og upplivingum kring landið.

---

**Í 2030** *skapar ferðavinnan tvær milliardir krónur í inntøkum. Av hesum stavar ein milliard frá vinnuferðavinnuni*

---

Vinnuferðagestir eru avgerandi fyri ferðavinnuna í Føroyum, og vit eiga at økja fokus á hendan ferðavinnubólk. Hesir gestir koma uttan fyri háárstíð, tá ið vinnan hevur mest tørv á gestum. Tey koma við vitan og netverki til landið og leggja harafturat nógvan pening eftir seg. Tey eru við til at menna okkara matmentan og tænastu sum heild og eru á henda hátt við til, at ferðavinnan kann bjóða fleiri støðug arbeiðspláss. Sum heild er henda ferðavinnugrein við til at økja um trivnaðin í landinum og eigur at verða ment soleiðis, at hon í størst møguligan mun ger gagn kring landið.

Kanningar vísa, at meir enn helmingurin av føroyingum heldur, at fleiri ferðafólk eiga at koma til Føroya í lágárstíð.

Fortreytirnar eru til staðar fyri, at vinnuferðavinnan kann vaksa. Føroyar eru eitt áhugavert ferðamál og hava tað, ið krevst fyri at skipa fyri stórum tiltøkum. Vit hava infrakervi, høgt tænastustøði, gistingarhús, matstovur og góðar ráðstevnu- og ítróttarumstøður. Og fram um alt hava vit royndirnar, førleikarnar og ambisjónirnar at skipa fyri og vera vertir.

Samlaðu inntøkurnar frá allari ferðavinnuni skulu vaksa frá uml. 800 milliónum krónum í 2019 til tvær milliardir krónur í 2030. Av hesum skulu inntøkurnar frá vinnuferðavinnu vaksa frá uml. 360 milliónum krónum í 2019 til eina milliard í 2030. Fyri at røkka hesum máli skulu íalt setast fimm milliónir krónur um árið beinleiðis til vinnuferðavinnu. Av hesum fara tríggjar milliónir til at skipa eina event skrivstovu, og tvær milliónir skulu setast í ein stuðulsgrunn, sum fyriskiparar av stórum tiltøkum kunnu søkja úr.

Átøkini leggja seg serliga upp at fýra av teimum 17 heimsmálunum.

## UMSETNINGUR Í VINNUFERÐAVINNU




## ÁTØKINI LEGGJA SEG UPP AT HESUM HEIMSMÁLUM






# VØKSTUR Á
# BURÐARDYGGARI GRUND

Við miðvísum arbeiði og fíggjarligari raðfesting kann vinnuferðavinna mennast soleiðis, at hon verður ein týðandi súla undir ferðavinnuni og føroyska búskapinum.

Skal helvtin av inntøkunum frá samlaðu ferðavinnuni í 2030 koma frá vinnuferðavinnu, er neyðugt at skapa nakrar yvirskipaðar karmar.

At skipa eina professionella event skrivstovu og at fáa eina stuðulsskipan eru fremstu fortreytir fyri at ferð skjótt kann setast á vinnuferðavinnuna. Somuleiðis er neyðugt at tað almenna arbeiðir miðvíst við grøna skiftinum og at skipa eina náttúrufyrisiting, soleiðis at Føroyar av røttum kunnu kalla seg eitt burðardygt náttúruferðamál í 2030.

---

**Føroyar eru eitt náttúruferðamál,** *og vit hava vitan og skipanir, ið varðveita náttúru og umhvørvi*

---



# TILMÆLI UM
# YVIRSKIPAÐAR KARMAR

**Ein event skrivstova er saman við eini stuðulsjáttan fyritreyt fyri at skapa vøkstur í vinnuferðavinnuni.**

Landsstýrið eigur at seta sum fremsta mál at gerast grøn í verki og ikki bara í orðum. Framtíðar ferðafólkið vil ferðast á umhvørvisvinarligan hátt og setir krøv til, at hotell, flutningur og tænastur annars eru grøn og hava umhvørvisgóðkenningar. Vit eiga at brúka ferðavinnuna sum ta broytingarmegi, hon er, eisini innan fyri náttúruvernd.

Tríggjar milliónir krónur skulu setast av til nýggju Event skrivstovuna, soleiðis at rúm er fyri at seta trý starvsfólk umframt pening til marknaðarføring. Event skrivstovan skal vera partur av vinnuferðadeildini hjá Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn. Fleiri kommunur og fleiri vinnufyritøkur skulu bjóðast upp í hetta samstarv.

Harumframt skulu tvær milliónir krónur setast av til at stuðla altjóða tiltøkum í Føroyum.

| KARMARNIR |
|---|
| Grøn í verki + 3 milliónir til event skrivstovu + 2 milliónir til stuðulsskipan |

### 1. EVENT SKRIVSTOVAN HEVUR M.A HESAR UPPGÁVUR:

> Tey trý starvsfólkini hava ábyrgd av hvør sínum øki – ráðstevnum, ítrótti og mentan – og høvuðsuppgávan er at bjóða Føroyar fram sum vert fyri stórum tiltøkum

> Samskipa og lætta um at fyriskipa tiltøk á teimum trimum fokusøkjunum

> Branda Føroyar burðardygt og draga tiltøk við denti á hugtøkini burðardygd og endurskapan (regenerative) til okkum

> Seta sum mál, at Føroyar verða nr. 1 í heiminum í vinnuferðavinnu

> Samskipa og stuðla undir tilboð kring landið, ið hóska til vinnuferðavinnu

> Fáa 300 ambassadørar, sum kunnu verða vertir fyri tiltøkum

> Arbeiða við sertifiseringum/góðkenningum (krøv til bygningar/hotell, orku)

> Stuðla undir at brúka føroyskar rávørur

### 2. TVÆR MILLIÓNIR KRÓNUR ÁRLIGA Í STUÐULSGRUNN TIL “ALTJÓÐA TILTØK Í FØROYUM”

Stuðulin kann annaðhvørt leggjast í ein grunn ella á serstaka játtan á fíggjarlógini. Stuðulsjáttanin kann t.d. umsitast av Event skrivstovuni.

Endamálið er, at fyriskiparar av stórum tiltøkum innan fyri ítrótt, mentan og ráðstevnur kunnu søkja um stuðul, soleiðis at tey hava dirvi til at bjóða seg fram. Játtanin skal bæði veita beinleiðis stuðul til tiltøk, ið ikki kasta pening av sær, og skal eisini virka sum undirskotstrygd til tiltøk, ið eiga at mala runt ella geva avkast, men hava ávísan vága við sær. Stuðulin eigur at verða treytaður av, at arbeitt verður burðardygt, t.d. við at føroyskar rávørur verða brúktar í størst møguligan mun.

Saman við trimum nýggjum starvsfólkum á Event skrivstovuni fer ein slík stuðulsjáttan at gera stóran mun, fyri at vinnuferðavinnan kann vaksa.



## 3. NÁTTÚRUVERNDARLÓG OG NÁTTÚRUGJALD

Í 2030 hava vit fingið neyðugu lógarkarmarnar, m.a. náttúruverndarlóg og lendislóg og eina sterka náttúrufyrisiting. Týdningarmesta tilfeingið hjá ferðavinnuni er náttúran, og fremsta áhugamálið er tí at verja og hjúkla um hetta tilfeingi. Við einum vøkstri í ferðavinnuni kemur eisini ábyrgdin at varðveita og ansa eftir okkara serstøku náttúru, og her kann ferðavinnan sjálv gerast eitt av amboðunum til at verja og endurskapa náttúruna.

Eitt náttúrugjald er sett í verk fyri útlendsk ferðafólk, sum koma til Føroya. Hetta fyri at staðfesta og vísa í verki, at Føroyar eru eitt náttúruferðamál, sum tekur ábyrgdina av náttúru og umhvørvi í álvara. Málini um gongd í haga og náttúrugjald eiga at tongjast saman, soleiðis at talan ikki verður um fleiri gjøld fyri at njóta náttúruna.

Uttan mun til gjaldið sjálvt er tað avgerandi, at inntøkan verður markað til náttúruna, t.d. við at fara í ein náttúrugrunn, og at tað ber til at vísa ferðafólki greitt á, hvat peningurin verður brúktur til.

## 4. GRØNAR GÓÐKENNINGAR TIL KOMMUNUR OG ALMENNAR STOVNAR OG FYRITØKUR

Fyritøkur, sum landið varðar av, hava fingið grønar góðkenningar og hava orðað bindandi umhvørvispolitikk. Landsstýrið hevur sett krøv til flutningsfeløg, ið sigla og flúgva til Føroya, um at seta skipanir í verk, sum geva ferðafólki møguleika at rinda eitt $CO_2$-gjald. Inntøkurnar frá $CO_2$-gjaldinum eru markaðar til at menna grønar flutningsloysnir. Hetta er fyrst og fremst avgerandi fyri umhvørvið, men eisini týðandi fyri vinnuferðakundar og fyri burðardyggu leiðina hjá Føroyum sum ferðamáli. Hetta hevur eisini stóran týdning fyri okkara pláss á GDS-Indexinum.

### CDS

Global Destination Sustainability Index er amboðið, sum vit nýta at sammeta okkum við onnur ferðamál. Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn hava limað Føroyar/ Tórshavn í GDS-indeksið. Hetta indeks samanber okkum við uml. 70 onnur ferðamál innan fyri burðardygd og er í samsvari við heimsmálini hjá ST.

## 5. ÚTBÚGVING OG FØRLEIKAMENNING

Hesar útbúgvingar eru settar á stovn:

- Hospitality management
- Event management
- Skrivstovuútbúgving við ferðavinnu sum sergrein
- Móttøkufólk
- Føroysk kokkaútbúgving á altjóða støði

## 6. FÁA REGLULIGT FLOGSAMBAND TIL STÓR EVROPEISKT KNÚTAPUNKT

Føroyar eru knýttar at stórum evropeiskum knútapunktum, so lættari er at koma til Føroya. Landið hevur stuðlað einari nýggjari rutu í ávíst áramál og hevur bjóðað slíka rutu út millum fleiri flogfeløg.

## 7. LOKALT VØRUMERKI TIL FØROYSKAR MATVØRUR

Vit hava fingið eitt einfalt føroyskt vørumerki til lokalar vørur. Størri tiltøk og ráðstevnur hava verið við til at ment føroyska matumhvørvið.

## 8. ARBEIÐSLOYVIR

Fólk úr øllum heiminum koma til Føroya at arbeiða sjálvboðið við endurskapandi náttúruátøkum. Árliga átakið hjá Visit Faroe Islands 'Closed for Maintenance – Open for Volontourism' hevur gjørt, at fleiri og fleiri vinnuferðafólk vilja koma higar at arbeiða sjálvboðið. Í dag skulu fólk uttan fyri Norðurlond hava arbeiðsloyvi fyri at arbeiða sjálvboðið.

## 9. HAGTØL

Hagstova Føroya fær árliga játtaðar 890.000 krónur til at menna og reka nýggju skipanina TSA (Tourism Sattelite Account) Eisini er játtan sett av til eina størri kvalitativa spurnakanning, ið verður gjørd triðja hvørt ár. At hava eina TSA merkir, at vit hava álítandi, standardiseraði hagtøl, ið verða framleidd á tjóðarhagstovunum, og sum kunnu samanberast tvørtur um landamørk.



*“we need visitors because it is in the relationship with ‘others’, that we understand who we are, that we develop and deepen our cultures and find out how we belong to the world.”*

Zita Cobb á ráðstevnu um regenerative tourism

# FLEIRI FUNDIR OG **RÁÐSTEVNUR TIL FØROYA**

Tað er ein stórur fyrimunur at kunna bjóða inn til fundir og ráðstevnur í Føroyum.

Fakfólk, granskarar, vinnulív og Setrið eru samd um, at tey fáa sera nógv burturúr at vera vertir. Nýggjar granskingarverkætlanir verða mentar, sambond verða skapt, og nógv verður sparrað millum luttakararnar. Granskarar fáa atgongd til fleiri granskingarpengar, fakliga vitanin verður lyft upp á eitt hægri stig og sjálvsálitið styrkist av, at onnur kenna tey sum føroyskar granskarar.

Tað er gott fyri fyritøkur, útbúgvingar- og fakstovnar at gerast sjónlig úti í heimi. Tað gevur positiva umrøðu og vísir tey fram sum eitt lokkandi stað, eisini fyri nýggj lesandi og starvsfólk.

### 10. FORMLIG AVTALA MILLUM FAKSTOVNAR OG EVENT SKRIVSTOVUNA

Skipað samstarv við formligum avtalum um ráðstevnur er gjørt millum fakstovnar sum Setrið, Landssjúkrahúsið, Havstovuna o.o. og Event skrivstovuna. Avtalurnar skulu tryggja tætt samstarv um ráðstevnur, strategi, hagtøl, boð o.a.

### 11. LANDSSTÝRIÐ BJÓÐAR FØROYAR FRAM SUM VERTSLAND

Føroyar eru vertir fyri altjóða ráðstevnum og toppfundum, sum politiska skipanin hevur tikið stig til. Føroyar koma á heimskortið, og føroyska samfelagið fær ágóðan av vitan á altjóða stigi. Á henda hátt menna vit sum land skjótt nýggjar loysnir og vitan út frá fremstu vitan í heiminum.

### STYRKIR

- Góðir ráðstevnukarmar, hotell, matstovur o.a innan fyri stuttan radius.
- Gott infrakervi (vegir, internet, nóg mikið av hotellkømrum o.s.fr.).
- Duga væl at skipa fyri.
- Nógv sereyðkenni í okkara vinnu og mentan, sum hevur stóran áhuga fyri hesi ferðafólk.

### AVBJÓÐINGAR

- Stór knútapunkt mangla í flogrutunum til Føroya, so sum Amsterdam og London.
- Skapa virksemi á smærri plássum eisini til hendan málbólk.
- Tænastustøðið úti um landið má hækka.
- Roaming avtalur millum útlond og Føroyar mangla.

### DØMI

Læknaráðstevna í Føroyum í 2017

450 luttakarar - 4 samdøgur = 1.800 gestanætur

**5,9 mió kr í samlaðari nýtslu**

# FØROYAR FRAMÁ VIÐ **ALTJÓÐA ÍTRÓTTARKAPPINGUM**

## At kappast fyri Føroyar á heimavølli er ein týðandi gularót fyri íðkarar, og týðandi netverk koma burturúr.

Fleiri ítróttarsambond hava góðar royndir við at skipa fyri stórum og altjóða ítróttarkappingum og stevnum. Flestu feløg hava sett sær sum mál at bjóða seg fram at vera vertur fyri stórum altjóða kappingum. Fótbóltur, hondbóltur, flogbóltur, svimjing og fimleikur hava í fleiri ár skipað fyri størri og smærri altjóða kappingum, og fleiri ítróttarsambond vilja hýsa slíkum altjóða kappingum eina ferð um árið.

Tað er umráðandi at arbeiða fyri at hava fleiri kappingar í Føroyum. Tað snýr seg um tjóðarstoltleika, tað setir okkum á heimskortið, og tað er neyðugt støðugt at flagga við Føroyum, so vit kanska ein dag fáa OL-limaskap. Altjóða kappingar menna sjálvsálit og stoltleika hjá fyriskiparum og íðkarum. Tær geva føroyingum nakað at savnast um og vera errin av.

### 12. STÓRHØLL

Ein stórhøll er ein varði á vegnum hjá ítróttini í Føroyum og ein fortreyt fyri stórum tiltøkum í vinnuferðavinnuni. Tað er umráðandi, at hugsjónin við komandi stórhøllini er burðardygg og endurskapandi, so hon verður eitt savningarstað fyri føroyskan ungdóm, har rørsla og tað heilsugóða lívið er í miðdeplinum. Aftur at hesum gevur stórhøllin ítróttini møguleika at skipa fyri heilt stórum tiltøkum, herundir altjóða ítróttarkappingum, stórum e-sport kappingum og ítróttar kongressum.

#### STYRKIR

- Sera góðar ítróttarumstøður innan fyri stuttan radius.
- Gott infrakervi (vegir, internet, nokk av hotellkømrum osfr).
- Trygt samfelag, foreldur kenna seg trygg at senda síni børn higar.
- Gott altjóða umdømi og vitan og royndir við at skipa fyri altjóða kappingum.
- Flestu ítróttarsambond eru professionell og væl skipað og hava ikki stórvegis tørv á hjálp til at bjóða seg fram at skipa fyri.
- Føroyar er eitt áhugavert ferðamál. Fjarstøðan til meginlandið er bæði fyrimunur og vansi.

#### AVBJÓÐINGAR

- Tørvur á betri samskipan til størri tiltøk.
- Ikki beinleiðis flogsamband við stór evropeisk knútapunkt.

#### DØMI 1

Í 2018 var NM í fótbólti fyri U21 landslið við luttøku úr Kina og Norðurírlandi.

8 lond - 212 luttakarar - 8 samdøgur = 1.771 gestanætur

**5,85 mió kr. í samlaðari nýtslu**

#### DØMI 2

Í 2015 varð HM í estetiskum fimleiki fyri børn í Føroyum.

532 luttakarar - 4 samdøgur = 2.128 gestanætur

**4,25 mió kr. í samlaðari nýtslu**

# MENTAN & LIST
# – Í HEIMSINS NALVA

**Tað ræður um at skapa heimsins navla, har vit eru, og vit eiga at brúka listina til at fortelja um okkum sjálv.**

Vit hava eitt sera ríkt og blómandi lista- og mentanarlív í Føroyum. Tað er kortini neyðugt, at tað almenna hevur ein nógv virknari leiklut, um listin skal blóma enn meira, soleiðis at vit megna at skipa fyri stórum mentanarstevnum í Føroyum. Høvuðsamboðini eru ein miðvísur mentanarpolitikkur, at vit fáa ein Tjóðpall og eina samtíðar listahøll, lagaligari treytir fyri stuðli og at skapa umstøður til at fáa ta list, ið verður skapt, fram á pall.

Umboð fyri mentan og list eru samd um, at tað er umráðandi at skipa fyri mentanartiltøkum og festivalum í Føroyum, tí tað er við til at styrkja og lyfta allan mentanar- og listapallin. Slík tiltøk eru ein fortreyt fyri at menna okkum sjálv og fyri at fáa føroyska mentan meir á breddan úti í heimi.

Symfoniorkestrið og leikurin Hamlet eru dømi um framsóknar mentanarverkætlanir, ið hava rokkið langt út um landoddarnar.



## 13. TÓRSHAVN EVROPEISKUR MENTANARHØVUÐSSTAÐUR 2030

Havnin er evropeiskur mentanarhøvuðsstaður í 2030. Tað hevur tikið fleiri ár og kravt eitt tætt samstarv millum kommunu og land at orða og vinna boðið uppá at gerast mentanarhøvuðsstaður. Føroyar eru partur av ES-samstarvinum Creative Europe, sum er ein fortreyt. Umfatandi fyriskipan er sett í verk, sum gagnar og styrkir menta- og listaøkið sum heild, og sum hevur styrkt førleikarnar at skipa fyri stórum mentanartiltøkum.

### STYRKIR

- Gott infrakervi, góð mentanar- og ráðstevnurhølir, góð hotell og matstovur.
- Duga væl at skipa fyri.
- FMA er týðandi tiltak, men stuðulsskipanir mugu endurskoðast so tiltakið kann mennast.
- FMX/FarLit/Filmshúsið eru týðandi aktørar, men mugu styrkjast og samstarva meir.

### AVBJÓÐINGAR

- Vantandi politiskt kjølfesti; mangla mentanarpolitikk og -visjónir.
- Mangla skipanir og stuðul til at framleiða, fasilitera og miðla list, tí listafólk fáa ikki listina út uttan hetta millumlið.
- Manglar ein útbúgving fyri týðarar og kritikarar á Setrinum. Tað mennir ritlistina og er alneyðugt til tess at fáa týtt meira til onnur mál.

## 14. MENTANARPOLITIKKUR

Land og kommunur hava orðað ein mentanarpolitikk við greiðum málum, ið sjálvsagt eru raðfest politiskt. Ein av stóru forðingunum fyri. at list og mentan fáa betri umstøður at virka, herundir at skipa fyri stórum mentanartiltøkum, er vantandi skipanir og greiðir karmar. Ein fortreyt fyri at skapa tann struktur, sum listin og mentanin sakna, er at myndugleikar orða ein mentanarpolitikk við visjónum og ítøkiligum málum.

## 15. MENTANARSTUÐUL

Almennu stuðulsskipanirnar fevna nú eisini um at fyriskipa, fasilitera og miðla list.

### DØMI

Nordic Performing Arts Days 2016

Festivalur fyri leiklist - Fakseminar

5 dagar - 25 framførslur - 100 listafólk - 4000 tøk setur

300 útlendskir luttakarar, artistar og luttakarar

Mett verður at gestir brúka í miðal 3.300kr/samdøgur

**5,94 mió kr. í samlaðari nýtslu**



Íblásturin til tilmælini stavar í stóran mun frá fýra stórum fundum, sum hildnir vórðu við umboð fyri ítróttina, mentanina, fakstovnar, ráðstevnuvertir, handils- og ferðavinnuna og kommunur.




business
UNINTERRUPTED







**Í 2030 gevur ferðavinnan tvær milliardir krónur í inntøkum. Av hesum stavar ein milliard frá vinnuferðavinnuni.**

M.a hesir karmar og átøk skulu setast í verk til tess at røkka málinum:

- Skipa eina professionella event skrivstovu
- Fáa eina stuðulsskipan til at skipa fyri altjóða tiltøkum í Føroyum
- Samtykkja náttúruverndarlóg, skipa náttúrufyristing og seta í verk náttúrugjald
- Tað almenna gongur á odda í grøna skiftinum og við at fáa umhvørvisgóðkenningar til almennar stovnar og fyritøkur
- Landsstýrið bjóðar Føroyar fram sum vertsland
- Havnin er evropeiskur mentanarhøvuðsstaður í 2030

Arbeiðið í ferðavinnubólkinum byrjaði á heysti 2021, tá ið Vakstrarforum gjørdi av at raðfesta vinnuferðavinnu sum vakstrarøki.

Løgmaður setti í 2021 Vakstrarforum, sum í hálvtannað ár skal arbeiða við møguleikum fyri virðisvøkstri í føroyska samfelagnum. Endamálið er at birta upp undir burðardygga virðisøking í breiðari merking, sum kann betra um og styrkja vælferðina í Føroyum.

Les meir á
**Vakstrarforum.fo**

